

*Fiskikappingin, sum borðtennisfelagið Nykur skipaði fyri í august í fjør, fekk rættiliga stóra undirtøku. Stívliga sjeyti fólk tóku lut í kappingini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**» ... í fiskikappingini, sum Nykur skipar fyri, verður eisini virðisløn latin fyri stuttligasta/ sjaldsamasta fiskin...**

# FØROYA stuttligasta fiskikapping

**Leygardagin hin 26. februar 2011 skipar borðtennisfelagið Nykur fyri eini sera stuttligari fiskikapping við tráðu á Skálafjørðinum. Loyvt verður at fiska heilt av Neshamri á Nesi og vestur á Raktanga á Strondum – ella um allan Skálafjørðin**



*Ein slík fiskikapping við tráðu er eisini ein rættiligur familjudagur – og her er sjálvt barnavognurin við*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Vilmund Jacobsen

Hetta er aðru ferð, at borðtennisfelagið Nykur skipar fyri eini fiskikapping, og í fyrru kappingini, sum var í august síðsta ár, vóru fleiri enn sjeyti luttakarar. Tá var bara loyvt at fiska við tráðu á eysturarminum á Skálafjørðinum, av Neshamri á Nesi og inn á Skipanes. Hetta gjørdist ein rættiligur familjudagur, har bæði vaksin og børn luttóku í kappingini. Meðan fólk fiskaðu við havnaløg og á ymiskum plássum kring um við klettin, koyrdu fólk út við kaffi og sunkist til vaksin og børn. Kappingin vardi í tilsamans seks tímar – frá klokkan 14 um dagin til klokkan 20 á kvøldi.

## Nógvir vinningar

Í kappingini hesaferð, sum verður leygardagin hin 26. februar, verður loyvt at fiska heilt av Neshamri á Nesi og vestur á Raktanga á Strondum.

Nógvir ymiskir vinningar verða at vinna og fólk, sum luttaka, hava høvi at vinna í ymiskum kappingum.

Talið av vinningum verður 15 og størsti vinningurin, sum borðtennisfelagið Nykur higartil hevur ognað sær, hevur eitt virði av umleið 2.000 krónum.

Teir ymisku vinningarnir, sum snúgva seg um alt frá reingerð av bili um tráðusett til fartelefonir, verða lutaðir burtur til tann, sum eitt nú hevur -

- Flestar veiddar fiskar (1, 2 og 3 fáa vinningar)
- Størstu samlaðu vekt
- Longsta fisk
- Tyngsta fisk
- Flestar reyðfiskar
- Flest longur
- Størsta hvíting
- Størsta lýsing
- Stuttligasta fisk/ Sjaldsamasta fisk
- Eisini verður drigið um vinning millum allar luttakararnar

Mát á ymisku fiskasløgunum verða latin við tilmelding, og luttakarar fáa eisini mát við sær, tá farið verður at fiska.

Luttøkugjald á 100 krónur verður fyri hvørja tráðu, og agn kann keypast við tilmelding, sum fer fram við havnalagið á Toftum.

Tilmelding fer fram frá klokkan 11.30 og út á seinnapartin, og klokkan 18.00 skulu allir luttakarar verða komnir aftur á havnalagið á Toftum.

Tá gjørt er upp, hvør hevur vunnið ymisku kappingarnar, verða virðislønir handaðar í Kafé Hópinum á Toftum klokkan 19, og síðan verður hugnaløta við sangi á kaféini.

Tilmelding til fiskikappingina, sum borðtennisfelagið Nykur skipar fyri, fer fram á telefon 580602.